## Solidaritetskonsert fyri arbeiðsleysum



Sunnudagin varð skipað fyri eini sonevndari solidaritets-konsert fyri arbeiðsleysu fiskafólkunum í Vardø í Noregi. - Hetta var eitt tiltak, har vit vildu vísa á samanhald í eini kommunu í Finnmørkini, eins og vit krevja, at okkurt verður gjørt við støðuna, sigur leiðarin í Arbeiðaraflokkinum í Vardø, Thor Robertsen, við FiskeribladetFiskaren. Í dag verður eingin fiskur virkaður í Vardø, hóast útróðrarflotin førir nógvan fisk til lands gjøgnum árið, samstundis sum fleiri trolloyvi eru heimahoyrandi í kommununi. Thor vísir á, at hátøkniligt fiskavirki stendur við stongdum hurðum, samstundis sum nógvir forsyrgjarar ganga arbeiðsleysir. - Hetta hevur verið støðan hjá fleiri familjum seinastu árini. Familjur eru samanbrotnar og eru vorðnar bundnar av sosialari veiting. Hetta er ikki virðiligt í einum vælferðarsamfelag sum tí norska, sigur hann. Millum tey, sum standa aftanfyri konserttiltakið fyri teimum arbeiðsleysu í fiskiídnaðinum, er eisini kirkjan í Vardø, og prestur fer sunnudagin at biðja og lýsa vælsignilsi yvir økið.

# Fiskivinna og landbúnaður

**- Høgu oljuprísirnir kunnu gera, at tað fer at loysa seg líka væl – og kanska betur - hjá skipunum at sigla til lands við størri nøgdum av sild til ídnað enn at sigla við smærri nøgdum til matna á marknaðin, sum liggur longur burturi. Haraftrat kemur, at útlit eisini eru til hægri ídnaðarprís, tá innihaldið av lýsi í sildini sum frá líður verður størri, sigur Roy Róin á Havsbrún í Fuglafirði**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Síðan skipini í felag góvust at fiska svartkjaft fyri umleið 14 døgum síðan, hevur eingin landing verið á ídnaðarvirkinum Havsbrún.

- Her hevur verið steindeytt, síðan skipini vóru inni og landaðu seinastu nøgdirnar av svartkjafti, sigur Roy Róin, sum starvast á virkinum í Fuglafirði.

Flestu skip eru á sild, sum verður landað til matna. Enn er sildin heldur rak, men sum frá líður fer hon at taka fiti til sín, og tá verður hon eisini bleytari.

### Óvist við fiski

Í Fuglafirði vita tey ikki at siga, hvussu summarið verður, og tey vita heldur ikki, nær væntandi er, at virkið aftur fer at fáa rávøru av týdningi til sína framleiðslu av mjøli og lýsi.

- Vit vænta, at Norðborg, sum sker og frystir sild til matna umborð, fer at koma til lands um nakrar dagar við avskurðinum, sum plagar at enda á Havsbrún. Vanliga plagar skipið at landa eini 500-600 tons av avskurðum aðru hvørja viku ella so – alt eftir, hvussu sildafiskiskapurin er.

Roy vísir á, at mjølprísurin hevur verið lágur, men hinvegin er prísurin á lýsi rættiliga góður.

- Hvørki svartkjafturin ella sildin hava nakað serligt innihald av lýsi stutt eftir gýting um várið, og tað er ikki fyrr enn seint um summarið og um heystarnar, at fiskurin aftur gerst feitur við lutfalsliga høgum innihaldi av lýsi. Tað er serliga, meðan sildin er soltin, at prísurin til matna er lutfalsliga góður, sigur hann.

### Ymiskar kvotur

Ein orsøk til, at nótaskipini herfyri góvust at fiska, er, at prísurin á svartkjafti til ídnað var lækkaður ein triðing í mun til prísirnar seinasta summar. Haraftrat var fiskiskapurin minkaður, og hetta saman við høgu



oljuprísunum gjørdi, at reiðaríini metti, at veiðan ikki loysti seg.

Eini 15.000 tons eru eftir av føroysku felagskvotuni av svartkjafti, meðan sildin,





## Toy til skjúrt

Toy til skjúrt, ið er framleitt í Føroyum, fæst í litunum reytt/svart, reytt/blátt og blátt/blátt.

**Fæst í hesum handlum:**

- Norðoya Heimavirki
- Eysturoyar Heimavirki
- Skálabúðin
- Sonja Design
- Marjun Heimá
- Seymiskrínið
- Vágs Heimavirki
- Seymistovan

Mýrifípan
Telefon 31 43 35

# Hvidbjørnen tók Stålholm

**Skiparin á norska línubátinum viðurkendi, at hann hevði brotið kunngerðina um lastaskipan og góðtók at rinda bót upp á 50.000 krónur**

EFTIRLIT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sunnumorgunin 1. juni fóru fólk av sjóverjuskipinum Hvidbjørnen umborð á norska stállínubátin Stålholm. Uppgávan hjá sjóverjuni var at fremja vanligt eftirlit.

Tá fólk komu umborð á Stålholm, var skipið á leiðini umleið 140 fjórðingar í ein útsynning úr Føroyum.

Undir eftirlitinum staðfesti sjóverjan, at lastaskipanin ikki var sambært kunngerð nr. 47 frá 9. apríl 2006, grein 6 stk. 1 og 2.

*- Tað hevur stóran týdning, at reglur um lastaskipan verða hildnar, tí tað er henda skipan, sum er grundarlagið undir uppgerðini av veiðini, sigur sjóverjan*



- Tað hevur stóran týdning, at hesar reglur verða hildnar, tí tað er henda skipan, sum er grundarlagið undir uppgerðini av veiðini í lastin, sigur eftirlitið.

### Góðtók bótina

Skiparin á Stålholm fekk fyrilagt ákærurit við bót upp á 50.000 krónur, og haraftrat varð hann biðin um at fara úr føroyskum sjógvi.

Skiparin viðurkendi seg sekan í brotinum og góðtók eisini bótina upp á tær 50.000 krónurnar.